

## Søguligt mál hjá Giggs

Málið, sum í gjár tryggjaði Manchester United trý stig á Upton Park, syrgdi fyri nýggjum meti til Ryan Giggs. Talan var um fyrsta Premier League málið hjá Ryan Giggs hetta kappingarárið, og við hesum hevur hann nú skotið mál í 17 kappingarárum á rað í fremstu røðini í enskum fótbólti, og tað hevur eingin gjørt undan honum. Undan dystinum í gjár var Gary Speed ájavnur Ryan Giggs, men Speed - sum eisini er walisi - spælir í ár við Sheffield United í næst bestu røðini, og tí fær hann ikki hótt metið hjá Giggs. Ryan Giggs spældi fyri fyrstu ferð við Mancester United í 1991, tá hann kom á vøllin í grannauppgerðini móti Manchester City. Í alt hevur hann nú spælt 787 dystir og skotið 147 mál fyri Manchester United.

## Odmar átti at bíðað

Í farnu viku gjørdi Odmar Færø sáttmála við danska superligu-liðið Brøndby. 19 ára gamli verjuleikarin hevur staðið seg væl sum verjuleikari hjá B36, og Heðin Askham, høvuðsvenjari, staðfestir, at saknur verður í Færø. - Odmar Færø skuldi spælt eitt ár í Formuladeildini afturat. Serliga við teimum avbjóðingum, sum B36 kann geva honum. Men tað er ein avgerð, hann hevur tikið, og sjálvandi skal hann fara, sigur Heðin Askham við heimasíðuna hjá B36, sum fegnast møguleikan, Odmar Færø hevur fingið. - Odmar hevur uttan iva førleikan at sleppa á besta liðið hjá Brøndby, leggur Heðin Askham afturat á heimasíðuni hjá B36.

## Rógvi er framtíðar maður í Aberdeen

**Vernjarin hjá Aberdeen heldur, at ungur føroyskur verjuspælari er framtíðar spælari á besta liðnum hjá felagnum**

FÓTBÓLTUR
*Eyðun Klakstein*
*eydun@sosialurin.fo*

18 ára gamli Rógvi Holm er ein framtíðar maður á besta liðnum hjá Aberdeen.

Tað heldur í øllum førum venjarin Jimmy Calderwood, sum sambært blaðnum Aberdeen Evening Express, rósar føroyska verjuspælaranum.

Rógvi Holm hevur verið í Aberdeen seinastu mánaðirnar, og hann hevur spælt fyri eykaliðið hjá felagnum.

- Mær dámar sera væl her í Aberden, og tað hevur eisini gingið væl við fótbóltinum. Mítt mál er at fáa nógvar dystir við eykaliðnum í hesum kappingarárinum og flyta meg rætta vegin, sigur Rógvi Holm við Aberdeen Evening Express.

Tveir aðrir føroyskir spælarar hava roynt seg í Aberdeen seinastu tíðina. Teir eru Gilli Sørensen og Hallur Hansson, sum báðir eru 16 ára gamlir.



*Rógvi Holm er ein spælari, sum Jimmy Calderwood væntar sær sera nógv av*

# Neistin kærir aftur

**Nýklaktu steypavinnararnir meta VÍF hava gjørt prosedurufeil í sínari kæru, og hartil meta teir niðurstøðuna hjá Kappingarnevndini byggja á eina ógvuliga veiku hypotesu**

HONDBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*



*Neistin vann á vøllinum. VÍF vann dystin hjá Kappingarnevndini, sum ásetti nýggjan dyst. Men hesin verður so í fyrsta umfari á borðinum hjá Dómsnevndini*

Seinasta sunnukvøld fingu Vestmenningar at vita, at teir fingu viðhald frá Kappingarnevndini hjá HSF í kæruni, sum teir høvdu sent inn um dystin móti Neistanum tann 18. januar.

Neistin vann dystin 38-37, men vestmenningar kærdu alt fyri eitt eina dómaraavgerð, sum beint undan steðginum kostaði VÍF eitt mál.

### Hypotetisk støða

Tað eru fleiri orsøkir til, at Neistin hevur valt at kæra úrskurðin hjá Kappingarnevndini.

Ein teirra er, at felagið metir avgerðina hjá Kappingarnevndini byggja á sera veikt grundarlag. Fortreytin hjá Kappingarnevndini fyri at áseta nýggjan dyst er, at VÍF »møguliga« kundi fingið eitt mál afturat í fyrra hálvleiki, um dómararnir høvdu dømt fríkastið at verða tikið av nýggjum. »Ein retrospektiv hypotesa« kallar Neistin hetta fyri í sínari kæru.

### Prosedurufeilur

Hartil førir Neistin í kæruni fram, at talan eisini er um prosedurufeil hjá VÍF.

Í fyrsta lagi verður sagt, at fordømir úr eitt nú donskum hondbólti staðfesta, at skal kærast um dómaraavgerð, eigur hendan at verað inngivin alt fyri eitt. Og kærandi felagið skal tá nokta at taka spælið uppaftur, fyrr enn dysturin byrjar aftur.

Neistin vísir í hesum sambandi á, at tað á dómaraseðlinum ikki framgongur, at nøkur protest er latin inn, og at hesin tí ikki kann nýtast sum grundarlag fyri kæruni. Hartil førir Neistin fram, at tá VÍF ikki hevur tryggjað sær, at teirra mótmæli er skrásett, hevur felagið í veruleikanum góðtikið avgerðina.

Og í triðja lagi finst Neistin eisini at Kappingarnevndini, sum felagið ikki metir hevur røkt sínar skyldur, tá tað ræður um at kunna seg nóg væl í málinum.

Samanlagt telur kæran frá Neistanum til Dómsnevndina níggju punkt, og skal Dómsnevndin altso taka støðu til hesi.

# Scolari sekkjaður

**Roman Abramovich misti tolið leygardagin, tá Chelsea enn einaferð floppaði á heimavølli. 0-0 javnleikurin móti Hull gjørdist seinasti dysturin hjá Luiz Felipe Scolari sum venjara á Stamford Bridge**

FÓTBÓLTUR
*Jákup Mørk*
*jakup@sosialurin.fo*




*Luiz Felipe Scolari varð í gjár uppsagdur sum manager hjá Chelsea*
*Mynd: Polfoto/AP*

Í gjárkvøldið gjørdist Scolari næsti venjarin á degnum, sum varð koyrdir úr starvi hjá einum Premier League.

Um morgunin var tað Tony Adams, sum varð sekkjaður í Portsmouth, og seinnapartin var tað so Scolari, sum stóð fyri tørni.

Við grundgevingini, at felagið vil varðveita royndina eftir teimum steypum, teir enn kunnu kappast um, sendi leiðslan Scolari til hús.

Í ensku miðlunum verður sagt, at tað fyrst og fremst var Roman Abramovich, sum vildi sleppa av við brasiliumaðurin. Sagt verður, at bæði spælarahópurin sum heild og Peter Kenyon, sum er stjóri í felagnum, høvdu fult álit á Scolari, sum av mongum verður sum ein av taktiskt sterkastu venjarunum í heiminum. Og eitt nú hevur Sir Alex Ferguson givið til kennar, at hansara fatan er, at leiðslan í Chelsea hevur verið dekan ov knøpp í síni avgerð.

Luiz Felipe Scolari gjørdist heimsmeistari við Brasilia í 2002, og hevur verið venjari hjá Portugal frá 2002 til 2008, tá hann tók við í Chelsea.

Hann fekk sostatt bert gott hálvt ár í felagnum, 36 dystir, harav hann vann 20, tapti fimm og spældi 11 javnleikir.

Chelsea liggur í løtuni á einum fjórða plássi í Premier League, umfram at teir enn eru við í Champions League og FA Cup.

Ray Wilkins, sum var hjálparvenjari hjá Scolari, verður á odda fyri liðnum til ein nýggjur venjari er settur í starv.

Ein av teimum, ið longu eru í uppskoti til venjara hjá Chelsea er fyrrverandi Chelsea-legendan Gianfranco Zola, sum í løtuni er venjari hjá West Ham. Hann hevur tó áður sagt, at hann ikki vil til Chelsea.